

*Vinmenninir Steintór Rasmussen og Hanus G. Johansen í Perluni í Havn í 1980.*

**EIGARI:** STEINTÓR RASMUSSEN

og sum vildu eiga nakrar dagar í Keypmannahavn saman. Vit spýttu í puljuna so frægt, at fjarskotna hetjan slapp at bumla longu leiðina í toki til høvuðsstaðin fyri at vera saman við okkum. Og brátt ljómaði Hans Jacob Glerfoss millum parcellhúsini í Søborg, drykkivísurnar hjá Cæsari á vertshúsi og Leonard Cohen allan vegin gjøgnum býin og náttina.

Tá tú vart í velmaktini, vardu tínir býtúrur oftani í fleiri dagar. Tað er ikki ov nógv fyri vanlig deyðilig menniskju. Og mangur við mær hevur undrast, hvussu væl tú orkaði at halda tørn, at vera uppi, at syngja náttina fulla og liva mitt í verðini. Men tú yvirlivdi tað harða lívið, og hevði tú ikki bremsað upp í tøkum tíma, eri eg bangin fyri, at títt kraftarverk var brent út.

Tú hevur orkað og hildið leingi. Við tínum gittara og tónastiga ert tú komin víða. Tú hevur sungið fyri innbodnum í roykstovuni í Kirkjubø, framført millum vísuvinir í Íslandi, hugtikið inuittar í Grønlandi, ferðast á vestlandinum í Noregi, yndað tað svenska og flent saman við hugnaligum dønum. Tú eigur vøgguvísuna til barnið og troystarkvæði til seinasta gestin. Tú syngur fegin, um bert fá eru, sum lurta, og tú syngur frítt, um tað eru fleiri túsund áhoyrarar. At vera nærverandi í tínum sangi er tín styrki. Tí minnast vit á magiskar løtur saman við tær.

Tú hevur válað gjøgnum lívið og eisini verið heimleysur í egnum landi. Tú fekst ein einvegis ferðaseðil aftur til Føroya í 1983. Men, sum umstøðurnar vóru, so kundi tú eins væl sett teg aftur í flogfarið og veittrað oyggjunum eitt endaligt farvæl. Tó vil eg halda, at hetta var point of no return í tínum lívi. At ein meining var við øllum. Tú skuldi, sum tann burturvilsti sonurin, koma heimaftur. Ikki til familjuna ella nakað netverk av týdningi. Men tað bíðaðu uppgávur eftir tær. Tú vart tann saknaða røddin í samfelagnum. Tann djarvi og speirekandi vísusangarin, sum fór at grava upp gomul skøld og gera tey livandi. Maðurin, sum skuldi fáa fólk at steðga upp og lýða á. Ein samfelagsrevsari og eitt sendiboð hjá kærleikanum. Tú skuldi fáa tjóðina at flenna eftir fananum og kasta akker á eydnunar tíðarhavi. Tú skuldi flyta mørk og flyta inn í fólkasálina.

Hanus! Tú hevur skrivað, sagt, hugtikið og gjørt so nógv spennandi, at tað vildi verið váðaverk at skrivað lívssøgu her. Men eg veit, at títt nærlagni er stórt, og í tínum yrki at goyma og niðurskriva løg er ein ómissandi partur av Hanusarsøgu longu skrivaður. Eg kann bara undrast yvir ein vakran og stóran sangskatt, sum varð tín gáva til lívið.

Tað er so lætt at unna teimum deyðu heiður og uppreisn, men tess størri er tað, at vit framvegis eiga og hava teg millum okkum sum ta skapandi og livandi menniskju, tú ert.

Góður skaldskapur sker inn á bein og vendur ranguna út á fólki. Í einum landi, sum stríðist fyri at yvirliva sum tjóð og at varðveita egið mál og mentan, hevur rødd tín týdning. Men í okkara vanahugsan skal Hanus G. Johansen upp úr songini klokkan sjey. Hann skal hava borgarligt arbeiði, keypa hús og seta seg fyri stórum lánum. Hetta at liva sum einabúgvi og vála sum eitt syngjandi landastrok øll vaksnamannaárini gera einans serskøltar og droymarar. Og hvørjum skulu bankastjórarnir koma við, um maðurin hinumegin borðið syngur og smíðar løg? Einum yvirberandi smíli?

Men í dag átti hvør Hanus og Janus at hugsað, at í Føroyum eigur tað ikki longur at vera ein spurningur, hvørjum vit liva av, men heldur hvørjum vit liva fyri! Hanus, sum mentamaður og sendiharrin heima og úti hevur títt tilfeingi stórt virði fyri alla tjóðina. Tú hevur livað fyri tónleikin, ta góðu yrkingina, tað vakra lagið og ta sterku framførsluna. Eg veit, at tað eisini finnast aðrir dýrgripir í tínum lívi. Tú eigur jú ein son og eina dóttir og góðar vinir kring landið og landamørk. At gera burturúr høgtíðum og føðingardøgum hevur ikki verið tín stílur. Men kortini plagar at vera eitt ávíst samsvar og góðar timingar í tínum gonguverki. At tú á degnum eisini laðar ein varða eftir listarmannin Hans Jacob Glerfoss, er stórfingið.

Góði Hanus! Eg verði ikki heima og tískil ikki millum gestirnar á føðingardegnum. Men vit fáa vónandi fleiri ríkar løtur í framtíðini. Og hjartaliga til lukku við 60 vøkrum og livaðum árum!